LM-067/2022

Fylgiskjal 9.

Kristvør H. Poulsen

Fra: Hákun Djurhuus <hd@sev.fo>
Sendt: mánadagur, 6. september 2021 21:43
Til: Kristvør H. Poulsen
Cc: SEV
Emne: SV: Til hoyringar: Uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd - freist 6. septembur 2021

Góðan dagin,

Vísandi til at ráðið gevur møguleika fyri, at SEV kann ummæla omanfyri nevnda uppskot, takka vit fyri tað.

SEV hevur ikki nakað at viðmerkja til fyriliggjandi uppskot.

Vinarlig heilsan/Best Regards

Elfelagið SEV
Hákun Djurhuus
Stjóri/CEO
Fartelefon/mobil +298 21 11 61
Telefon/telephone +298 34 68 10

Fra: SEV <sev@sev.fo>
Sendt: 26. juli 2021 08:23
Til: Hákun Djurhuus <hd@sev.fo>
Emne: VS: Til hoyringar: Uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd - freist 6. septembur 2021

Fra: Kristvør H. Poulsen <Kristvorp@uvmr.fo>
Sendt: 23. juli 2021 15:24
Til: Føroya Fuglafrøivelag <ffff@kallnet.fo>; Bóndafelag Føroya <sigert@bondi.fo>; Búnaðargrunnurin <bg@bg.fo>; BST Postur <bst@bst.fo>; Ari Johanneson <AriJ@us.fo>; Ferðavinnufelagið <birita@industry.fo>; FNU <fnu@fnu.fo>; Fróðskaparsetur Føroya <setur@setur.fo>; Froskmannafelagið <christiansen.david@gmail.com>; Føroya ferðaleiðarafelag <ferdaleidari@gmail.com>; 'Kommunufelagið' <kf@kf.fo>; Føroya Kærustovnur <fks@fks.fo>; 'Føroya landfúti' <politi@politi.fo>; 'Føroya Ríðingafelag' <hansenhallur@gmail.com>; 'Føroya Sílaveiðufelag' <info@laks.fo>; 'Føroya skótaráð' <scout@scout.fo>; 'hav@hav.fo' <hav@hav.fo>; Jarðfeingi - Postur <Jardfeingi@jardfeingi.fo>; Landsverk <lv@lv.fo>; ringras@ringras.fo; SEV <sev@sev.fo>; us <us@us.fo>; savn <savn@savn.fo>; Skogfridingarnevndin <Skogfridingarnevndin@us.fo>; post@sorinskrivarin.fo; Almannamálaráðið <amr@amr.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; Mentamálaráðið

LM-067/2022

<ummr@ummr.fo>; JJE014@politi.dk; friðingarnevndin fyri Suðuroy <JAV001@politi.dk>; Friðingarnevndin fyri Streymoyar, Sandoyar og Vága sýslu <LFM002@politi.dk>; LUM Postur til Stovnin <lum@lum.fo>; Biofar - høvuðsmail <biofar@savn.fo>; fiskaaling@fiskaaling.fo; Heilsufrøðiliga starvsstovan <hfs@hfs.fo>; jallur53@gmail.com; Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>; runahjelm@gmail.com; industry@industry.fo; livfrodingafelag@gmail.com; Visit Faroe Islands <info@visitfaroeislands.com>
Emne: Til hoyringar: Uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd - freist 6. september 2021

Uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd til hoyringar

Umhvørvis- og vinnumálaráðið sendir við hesum uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd til hoyringar. Saman við uppskotinum til náttúruverndarlóg verður eisini uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um náttúrufriðing sent til hoyringar.

Uppskotið til náttúruverndarlóg kemur í staðin fyri ein part av galdandi náttúrufriðingarlóg, men fevnir eisini munandi víðari enn galdandi lóg. Av tí at uppskotið til náttúruverndarlóg ásetur nýggjar reglur um skipan av verndarøkjum og vernd av dýra- og plantusløgum, verða friðingarheimildirnar tiknar úr náttúrufriðingarlógini. Eftir uppskotinum til náttúruverndarlóg verður tað landsstýrismaðurin, sum við kunngerð skal kunna seta slík verndartiltøk í verk, og ein náttúrufyrisiting undir landsstýrismanninum, sum skal skipa og sita fyri verndini í verki.

Uppskotið til náttúruverndarlóg er ein liður í at fremja sáttmálan um lívmargfeldi í føroyskari lóggávu og miðar eftir at røkja lív-, landslags- og jarðfrøðimargfeldið umframt tær vistfrøðiligu tilgongdirnar í tí føroysku náttúruni, bæði fyri náttúruna sjálva og fyri náttúruna sum grundarlag undir burðardyggum virksemi, tilfeingi, mentan, heilsu og trivnaði hjá Føroya fólki.

Uppskotið dagførir og fjøltáttar regluverkið um vernd av dýra- og plantusløgum og um økisvernd og útvegar heimildir til at basa hóttanini frá fremmandum lívverum.

Freistin at lata inn ummæli er mánadagin 6. september 2021.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið